# SÁTTMÁLI

Millum undirritaðu

Føroya Arbeiðarafelag

øðrumegin og

Føroya Arbeiðsgevarafelag

hinumegin er í dag gjørdur hesin sersáttmáli.

§ 1

Øki sáttmálans

Sáttmálin fevnir um øll arbeiðsfólk, sum starvast á virkinum hjá Varðin Pelagic á Tvøroyri og Pelagos í Fuglafirði, herundir eisini lossing og avskiping.

§ 2

Lønarásetingar

Partarnir eru samdir um, at tímalønin fyri allar tímar í samdøgrinum, mánadag til og við fríggjadag (mánamorgun kl. 00.00 til fríggjadag kl. 24.00) verður kr. 145,21[1] um tíman, og er hetta galdandi uttan mun til hvussu vaktirnar eru skipaðar ella um arbeitt verður vanliga normaltíð.

Fyri arbeiði leygar- sunnudag og aðrar halgidagar umframt frídagar sambært sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, verður lønin, sum ásett í sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag, herundir galdandi yvirtíðartakstir. Tímalønin er pr. 1. mai 2014 kr. 194,44[2] fyri leygardagar og kr. 235,68[3] fyri sunnu- og halgidagar.

Harumframt skal gjaldast aldursviðbót sambært teimum til eina og hvørja tíð galdandi takstum í sáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Partarnir eru samdir um, at lønin framyvir hækkar við sama prosentstigi, sum lønin hækkar við samráðingarnar, sum Føroya Arbeiðarafelag framyvir fer at hava við Føroya Arbeiðsgevarafelag um sáttmálaviðurskiftini á privata arbeiðsmarknaðinum.

Um arbeiðsfólkið ynskir tað, og fakfeløgini skrivliga góðtaka hetta, so kann lønin ásetast til kr. 134,53[4] pr. tíma á dagvaktini (frá kl. 08.00 – 20.00) og kr. 155,89[5] pr. tíma á náttarvaktini (frá kl. 20.00 – 08.00) frá mánadegi kl. 00:00 til fríggjadag kl. 24:00.

§ 3

[1] 1. mai 2015 kr. 148,42
[2] 1. mai 2015 kr. 198,73
[3] 1. mai 2015 kr. 240,88
[4] 1. mai 2015 kr. 137,50
[5] 1. mai 2015 kr. 159,33

Summarfrí

Viðvíkjandi summarfrí verður víst til galdandi frítíðarlóggávu.

§ 4

Aðrar ásetingar

Har aðrar ásetingar ikki eru gjørdar í hesum sersáttmála, so eru ásetingarnar í høvuðssáttmálanum millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag galdandi, herundir ásetingarnar um eftirlønargjøld, limagjøld og aðrar ásetingar. Viðbót fyri sildaarbeiði verður tó ikki galdandi fyri hendan sáttmála.

Viðvíkjandi ásetingini um upplýsingar til arbeiðsfólk um nær arbeiði byrjar (§ 9 í høvuðssáttmálanum), so skal freistin sambært hesum sáttmála vera 8 tímar. Um serlig viðurskifti eru, t.d. fólk ikki møtir til arbeiðis vegna sjúku, so er nevnda 8 tíma freist ikki galdandi tá onnur fólk skulu boðsendast til arbeiðis.

§ 5

Gildisskeið og ætlanarlýsing

Hesin sersáttmáli er galdandi frá undirskrivingardegnum og kann uppsigast við tríggjar mánaða freist til í fyrsta lagi 1. mai 2016.

§7

Sáttmálaeintøk

Hesin sersáttmáli verður undirskrivaður í tveimum einsljóðandi eintøkum og fær hvør partur sítt eintak.

Tórshavn, tann 6. mai 2014

Føroya Arbeiðarafelag

Føroya Arbeiðsgevarafelag